TÓRSHAVNAR KOMMUNA



Komandi summar verður nýggji barnagarðurin á Velbastað tikin í nýtslu. Hesin skal húsa bæði barnagarðinum og vøgguvstovuni, sum nú húsast í hvør sínum húsi undir Borgarhálsi.

## Leiðari til Barnagarðin á Velbastað

Tórshavnar kommuna søkir eftir leiðara 40 tímar um vikuna til Barnagarðin á Velbastað, at byrja 1. november 2005 ella eftir avtalu.

**Vit bjóða**
- eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur stóran leiklut í gerandisdegnum og har spælið fyllir nógv
- møguleika at seta dám á stovnin
- møguleika fyri ráðgeving
- møguleika fyri eftirútbúgving

**Vit vænta at tú**
- ert útbúgvin pedagogur
- hevur leiðsluroyndir
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur hugsjónir um virksemi í einum dagstovni
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrum og starvsfeløgunum
- kanst virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- dugir væl at samskifta, bæði innan - og uttanhýsis
- ert opin fyri møguligum bygnaðarbroytingum
- hevur teldukunnleika á brúkarastøði

**Setanarviðurskifti**
løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Katrin Petersen, samskipara ella Jákup Simonsen, deildarleiðara tlf. 302010 / 254022

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 17. oktober 2005.

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

## Javni søkir dagligan leiðara

Sum dagligur leiðari kemur tú í stóran mun at skapa starvið.

Tínar uppgávur verða m.a. í tøttum samstarvi við nevnd og formann:
- at føra visjónirnar hjá Javna út í lívið
- at leggja ætlanir fyri arbeiðið út frá teimum málsetningum, nevndin setur
- at umboða felagið á fundum og í fjølmiðlum
- at samskifta við limir og myndugleikar
- at reka skrivstovu felagsins, herundir at leggja fíggjarætlanir

Eginleikar/førleikar:
- tú brennir fyri at bøta um korini hjá menningartarnaðum
- tú ert álitisvekjandi og álítandi
- tú megnar at tosa til bæði hjarta og heila hjá fólki
- tú ert fyrikomandi og dugir væl at samskifta – bæði í skrift og talu
- tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt – og at deila uppgávur út
- tær dámar avbjóðingar og tú ert málrættað/ur
- tú hevur lætt við at seta teg inn í nýggj viðurskifti
- tú dugir at nýta vanlig telduforrit
- tú hevur viðkomandi útbúgving
- tú hevur fíggjarligt innlit og fyrilit

Arbeitt verður ½ tíð eftir nærri avtalu.
Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Umsókn við cv verður send Javna, Hoydalsvegi 40, postboks 1133, 110 Tórshavn, innan 15. oktober.

Fleiri upplýsingar fáast á heimasíðuni www.javni.fo ella við at venda sær til Óla Wolles, tlf. 442031 ella 742031, helst eftir kl. 16.00

JAVNI

*Javni* er felag fyri menningartarnað og teirra avvarðandi. Felagið hevur góðar 1000 limir.
Endamál felagsins er at stuðla fólki við menningartarni og avvarðandi teirra og virka fyri áhugamálum teirra. Javni virkar fyri javnlíkindum, javnrættindum og rættartrygd fyri fólk við menningartarni.

FAROE DIVE.fo



**Grundskeið í Kaving í Tórshavn**
**frá 07. til 20. oktober skipar Faroe Dive fyri grundskeiðið í kaving í Tórshavn.**

**Grundskeið í kaving í Klaksvík**
**Frá 14. til 31. oktober skipar Faroe Dive fyri grundskeiðið í kaving í Klaksvík.**

**Undirvísingin er skipa í 3 partar teori, svimjihøll og sjógv. Ikki er neyðugt at eiga útgerð fyri at luttaka. Undirvíst verður eftir vanliga arbeiðstíð.**

**Kostnaður Kr.4000,-**

**WWW.FAROEDIVE.FO**

Faroe Dive
Dive Center
Mylnugøta 17kj.
700 Klaksvík
tlf. 218929 el. 458939
email. faroedive@post.olivant.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 792,** P/F Jóannes Thomsen, 530 Fuglafjørður.
**Nevnd:** Farin úr nevndini: Gordon Martin Peturson Midjord, Bøvegur 24, 530 Fuglafjørður (nevndarlimur)
**Innkomin í nevndina:** Kristian Martin Petersen, 530 Fuglafjørður (nevndarlimur)
**Innkomin sum nevndarformaður:** Jóannes Thomsen, 530 Fuglafjørður
**Farin frá sum nevndarformaður:** Pauli Martinson Jarnskor, 512 Norðragøta

*Skráseting Føroya*
*tann 27. september 2005*
*Kristin Balle*

Lesið Sosialin

## Leiðari
### til Musikkskúlan í Suðuroy

Musikkskúlin í Suðuroy søkir eftir leiðara.

Musikkskúlin væntar at umsøkjarar skulu:

- hava kunnleika til musikkskúlaarbeiði
- vera kveikjandi
- duga at skipa fyri
- hava góð samstarvsevni

Setanartíðarskeið:
1. november 2005–31. juli 2006.

Løn eftir avtalu, ið skal góðkennast sambært § 5 stk. 5 í kommunustýrislógini.

Umsóknarfreist: 14. oktober 2005.

Musikkskúlin í Suðuroy er partur av føroysku musikkskúlaskipanini.

Umsókn skal sendast til:

**Musikkskúlin í Suðuroy**
v/ Elin Nielsen
870 Fámjin